

Johan Sverdrup. Mynd: Statoil

# Fingu risaavtalu á Stord - 250 arbeiðspláss bjargaði

**Jógvan Hugo Gardar**

08.06.2015 - 07:53

Oljan.fo

Heilt stóra søgan í oljuheiminum í morgun er at Statoil hevur bjóða norsku fyritøkuni Kværner og amerikansku KBR uppgávuna at byggja høvuðspartin av tí sum skal gerast til íbúðar- og útgervarpallarnir í samband við útbyggingina av Johan Sverdrup-økinum.

Talan er um eina avtalu fyri heilar 5,7 milliardir danskar krónur (6,7 milliardir norskar krónur), og hon kemur at geva arbeivi til nógvar undirveitarar sum bjóða seg fram innan oljuvinnuna. Kværner er tann størsta fyritøkan innan skipa- og pallasmið í Noregi, og KBR (fyrrverandi Kellogg, Brown & Root) er eitt amerikanskt verkfrøðinga- og byggifelag.

Í einum tiðinaskrivi fra Kværner í morgun verður sagt at tey hava vunnið kappingina um hesa uppgávuna í hørðum dysti við fleiri aðrar fyritøkur.

Avtalan hevur sera stóran týdning fyri Kværner, sum í februar tapti dystin um at byggja dekkið til sjálvan boripallin. Nú er tað so avtalan um dekkið til íbúðar- og goymslupallin sum er komin undir land.

Kværner ger stálundirpartarnar til pallarnar á Kværner Verdal. Sjálvt dekkið skal byggjast á Kværner á Stord, har eini 200 til 250 starvsfólk hava liva í óvissuni um tey koma at hava arbeiði ella ikki, tí Kværner hevur ikki eydnast í at fáa nakrar størri uppgavur til hesa smiðjuna seinastu tíðina.

Við uppgávuni sum fyritøkan nú hevur fingið á Stord, roknar leiðslan við at tey koma at gerast meir kappingarfør tá nýggjar uppgavur fara at koma í oljuídnaðinum komandi árini